gult cyan magenta svart




Pierre Fabre




Klorane hártilbúningarnir innihalda plantuúrdráttir, sum t.d.: myrtu, havru, brenninotu, fruktir frá Schlercheratrøum, kornblómum, kinabørki og baldursblómum.

Pierre Fabre

Lise-Lotte, serfrøðingur frá Pierre Fabre, verður at hitta á apotekinum í Tórshavn mánadagin 12. mars og týsdagin 13. mars og
í Apoteksútsøluni í Runavík mikudagin 14. mars og hósdagin 15. mars.

Tjaldurs Apotek - R. C. Effersøesgøta 31 - 100 Tórshavn - Tlf. 341100




Tú sært skjótt, at HTH ikki eru sum hini. Tí við 30 ára royndum hava vit uppbygt ein heilt serligan kunnleika um at virka úr viði, um snið og funktión, hvussu vit tryggja eitt gott umhvørvi inni – og ikki minst hvussu tú ómakaleyst fært ein nýggjan køk, sum tú ert nøgd/ur við. Stutt sagt: Tú fært tað munandi betri hjá Køksmiðstøðini.

... tú fært tað munandi betri hjá Køksmiðstøðini

HTH Køksmiðstøðin
Á Hálsi • FO-100 Tórshavn • Tel. 314949 • Fax 311330 • E-mail: hthdul@post.olivant.fo

www.hth-kokar.com


Tíðindaskriv:

# Útbúgvingarskrá í Heilsu, Trygd og Umhvørvi



Oljuvirksemið, ið nú tekur seg upp í Føroyum, setur stór krøv til heilsu, trygd og umhvørvi (HTU). Handilsháskúlin BI í Stavanger hevur saman við Føroya Handilsskúla tikið ímóti hesi avbjóðing og gjørt eina útbúgvingarskrá í modulum.

Útbúgvingarskráin er ætlað øllum teimum, ið beinleiðis ella óbeinleiðis koma í samband við nýggju lóggávuna, sum er gjørd til at varða um HTU í sambandi við leitivirksemi á føroyska landgrunninum. Skráin er serliga ætlað teimum, ið arbeiða ella ætla sær at arbeiða hjá oljufeløgum ella veitarum undir teimum.

Útbúgvingarskráin svarar til 30 ECTS-stig*) og er býtt í fimm modul.

*Modul 1:*
Lóggávan um HTU í leitiskeiðinum
*Modul 2:*
Leiðsla og stýring av HTU í oljuvirkseminum
*Modul 3:*
Leiðsla og stýring av HTU í oljuvirkseminum, framhald
*Modul 4:*
Umhvørvi
*Modul 5:*
Heilsa og arbeiðsumhvørvi

Í 1. moduli fáa luttakararnir innlit í mest týðandi partarnar av oljulóggávuni, ið stýra heilsu, trygd og umhvørvi, t.e. løgtingslógin um kolvetnisvirksemi, kunngerðin um heilsu, trygd og umhvørvi í leitiskeiðinum, viðmerkingarnar til útbjóðingarlógina v.m. Nomið verður við loyvisskipanina, HTU-hugtøkini, tilbúgvingarspurningar, HTU við atliti at virðishugsanini hjá feløgum og samfelagnum, ábyrgd og uppgávur hjá myndugleikum og oljufeløgum o.a.

Í 2. og 3. moduli fáa luttakararnir innlit í grundleggjandi hugtøk sum góðtøkumerki, ALARP, váða- og tilbúgvingargreiningar, virðishugsan, trygd og óvissa, avleiðingar v.m. Nomið verður við grundleggjandi mál og ætlanir, ið eru týdningarmiklar í sambandi við at leggja virksemið til rættis við atliti at HTU.

Í 4., og 5. moduli verður dentur lagdur á evni, ið knýta seg at heilsu og arbeiðsumhvørvi hjá teimum, ið arbeiða í oljuvinnuni, so sum vernd móti geislavirkni og krabbameinselvandi tilfari, lutfallið millum arbeiðið og frítið o.a. Í umhvørvismodulinum verður nomið við ivamálsorðingar so sum, hvat er eitt reint umhvørvi, hvat tolir umhvørvið, stýringsskipanir sum stýra óynsktum ávirkanum, viðgerð av burturkasti, basan av bráðfeingis dálkingum o.a

Vert er at geva gætur, at eitt av 5 krøvum til virkir, sum ætla sær í oljuvinnuna, er, at tey skulu hava eina skipan fyri heilsu, trygd og umhvørvi.

Tað fyrsta skeiðið verður 27., 28. 29., og 30 mars 2001 á Hotel Føroyum

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Skeiðtænastu Handilsskúlans, tlf. 31 88 13

**) ECTS er »European Credit Transfer System«*

Tíðindaskriv frá Starvsmannafelagnum:

# Nógv fólk at aðalfundi

Leygardagin hevði Starvsmannafelagið sín 40. aðalfund

Starvsmannafelagið hevði ársaðalfund leygardagin 3. mars í Havnar Klubba.

Hetta var 40. aðalfundur felagsins. Umleið 1700 limir eru nú í Starvsmannafelagnum.

Rættuliga nógv fólk var á fundi, og vórðu vanlig felagsmál til viðgerðar.

Nevndarval var eisini á skránni og stóðu John Kjær og Marin Katrina Frýdal fyri vali. Marin Katrina bar seg undan afturvali, og í hennara stað varð Selma Ellingsgaard val, meðan John Kjær varð afturvaldur.

Hinir nevndarlimirnir eru: Gunnleivur Dalsgarð, formaður, Heini Joensen og Ingun Olsen.

Tiltakslimirnir eru Suni Selfoss (afturvaldur) og Gunnvá Hansen (nývald).

Efirlønargrunnur Starvsmannafelagsins hevði aðalfund beint aftaná, og varð sitandi nevnd: John Kjær, Jákup Danielsen og Gunnleivur Dalsgarð afturvald.

Grunnurin er væl fyri og samtykt varð at fara undir at útbyggja tryggingarskipanina við trygging í sambandi við hættisligar sjúkur, sigur Starvsmannafelagið í tíðindaskrivi.



# Føroyar millum fimm bestu leitiøki í heiminum



*Scott Urban, varaforseti hjá BP her saman við løgmanni Anfinn Kallsberg og Hjarnar Djurhuus, stjóri hjá BP í Føroyum.*
*Mynd Jan Müller*

**BP raðfestir Føroyar sera høgt og fyrsti brunnurin, sum felagið fer at bora á landgrunninum í juli, telist millum teir fimm best lovandi í øllum heiminum**

SAMRØÐA VIÐ BP STJÓRA
*Jan Müller úr London*

– Hetta eru sera spennandi tíðir fyri BP á Atlantsmótinum, og tað er eingin loyna, at vit í BP ætla at endurtaka væleydnaðu úrslitini vestan fyri Hetland á føroyska landgrunninum eisini. Sigur Scott D. Urban, sum er varastjóri í eini av heimsins størstu fyritøkum, oljurisanum BP. Scott Urban var millum mongu bretsku gestirnar, sum høvdu leitað sær á móttøkuna í London, sum Anfinn Kallsberg, løgmaður skipaði fyri undir vitjan síni í Bretlandi í farnu viku.

Scott Urban sigur seg vera sera væl nøgdan við úrslitið av arbeiðinum vestan fyri Hetland, har BP í dag er fyristøðufelag fyri báðar framleiðandi oljukeldurnar, Schiehallion og Foinaven. –Vit hava funnið stórar oljugoymslur, og vit hava fingið bilbukt við tí annars sera harðbalna umhvørvinum úti á víðum havi. Og tað eru hesar royndir, sum vit nú taka við okkum inn á føroyskt øki, tá vit fara at bora fyrsta brunnin í juli í ár. Vit halda, at vit fara at hava eydnuna við okkum longu í hesum árinum, og finna vit eina stóra oljukeldu, sum vit hava góðar vónir um, so fara vit undir eina »appraisal« boring longu í hesum árinum. Hetta eru brunnar, sum skulu siga nakað um støddina á feltinum.
BP-stjórin ivast onga løtu í týdninginum, sum leitingin við Føroyar, hevur fyri felagið. –Hyggja vit at øllum okkara leitimøguleikum í dag, so er brunnurin vit skulu bora við Føroyar ein av teimum fimm bestu í øllum heiminum. Vit hava longu peikað út staðið, har vit fara at bora, og tað sær út til at goyma stórar nøgdir av olju. Scott Urban sigur, at støddin á feltinum teir eru eftir við síni fyrstu boring við Føroyar, kann vera millum 500 milliónir til eina milliard tunnur av olju. Tvs. um somu stødd sum Schiehallion ella tvær ferðir so stórt. Hetta er tað, sum oljufeløg vanliga kalla ein elefant.

At tað eru borað meira enn 150 brunnar vestan fyri Hetland og bert tvær keldur eru í framleiðslu sær Scott Urban ikki sum nakað ringt tekin. –Tvær báðar keldur, sum framleiða, standa vit í BP fyri og báðar eru í sama øki nærhendis føroyska landgrunninum, har vit nú fara at leita. Scott Urban sigur annars, at teir eru í ferð við at knýta fleiri minni »fylgisveinakeldur« til stóru feltini. Tá tíðin er búgvin fara teir eisini at seta á Suilven-feltið, sum liggur nakað norðan fyri verandi keldur. Eisini fara teir at taka endaliga støðu í seinni helvt av hesum árinum til at lata upp fyri stóra Clairfeltinum, sum liggur longur eysturi, og sum varð funnið í 78.

## Tætt samstarv

Scott Urban sigur annars, at útlit eru til, at tað kann blíva eitt tætt samstarv í øllum oljuøkinum millum Føroyar og Bretland í framtíðini. Her sipar hann til ein felags infratstruktur tvs. m.a. rørleiðing, ið kann brúkast bæði av olju- og gasskeldum á føroyskum og á bretskum øki. Eisini síggja teir møguleikar fyri felags útgerðarhavn og –virksemi til alt økið, báðumegin markið. Og koma framleiðslukeldurnar at liggja nær hvørjari aðrari, eru eisini møguligar fyri at útbyggja hesar í felag báðumegin markið.

Uppá fyrispurning hvat vil vera best fyri Føroyar, um olja verður funnin, antin at flyta oljuna til lands ella flyta hana til oljuterminalar aðrastaðni sigur Scott Urban, at tað enn er ov tíðliga til at taka støðu til slíkt. Fyrst má ein vita, um olja er her, og so eiga føroyingar at taka ta avgerð, sum er skilabest fyri Føroyar.

Hvat viðvíkur tí stóra økinum, sum liggur fjalt undir basalti, so heldur Scott Urban, at hetta verður ein komandi avbjóðing fyri oljufeløgini. –Men lat okkum nú fyrst finna olju í teimum økjum, sum eru lutað út. Finnur tú olja her, so verður tað munandi léttari at fara víðari norður og vestur eftir undir basaltið.

BP-stjórin er sera væl nøgdur við tiltakið í London og høvi at hitta bæði løgmann og oljumálaráðharran. –Eg síggi fram til eitt sera gott samstarv við føroyingar í framtíðini.

Verður nógv gass funnið við Føroyar, so ber til at knýta eitt føroyskt gassfelt til komandi gassleiðing, sum í næstum verður lagdur á havbotnin vestan fyri Hetland.

*Scott Urban, varaforseti í BP her saman við Anfinn Kallsberg, løgmanni, Eyðun Elttør, oljumálaráðharra og Hjarnar Djurhuus, stjóri hjá BP í Føroyum.*

*Mynd Jan Müller*




HYGG HER

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

| Verksmiðjumerki | km. | mán. | árg. | søluprísur |
|---|---|---|---|---|
| Ford Fiesta 1,3 3h | 129.500 | Nov. | 1988 | 12.500,- |
| MMC Lancer stw. 1,8D (Sýnaður 12/00) | 225.500 | Mai. | 1987 | 29.900,- |
| Citroen BX 1,6 Selection 5h | 55.000 | Aug. | 1992 | 50.000,- |
| Ford KA 1,3i 3h | 38.000 | Mai. | 1998 | 69.000,- |
| Ford Transit 2,5TD (Sýnaður 02/01) | 188.000 | Mai. | 1993 | 72.000,- |
| Citroen ZX 1,9D stw. | 84.500 | Nov. | 1995 | 85.000,- |
| Citroen ZX 1,4 Image 5h | 83.500 | Mars | 1996 | 85.000,- |
| Renault 19 5h | 85,500 | Mars | 1996 | 89,000,- |
| Citroen ZX 1,9 stw. | 75.500 | Nov | 1995 | 89.000,- |
| MMC Galant 2,0 GLSI 5h | 186.500 | Juni | 1991 | 89.900,- |
| Citroen ZX 1,4 5h | 39.000 | Apríl | 1997 | 91.000,- |
| Renault Megane 1,6e (Sýnaður 12/00) | 36.000 | Nov. | 1996 | 109.000,- |
| Toyota Corolla 2,0D stw. (Sýnaður 03/01) | 95.500 | Des. | 1996 | 119.900,- |
| Citroen Xantia 1,9TD stw. (Sýnaður 12/00) | 85.500 | Mars | 1996 | 125.000,- |
| Nissan Primer 2,0SLX 4h | 25.000 | Aug. | 1997 | 139.000,- |
| MMC Carisma 1,8GDI 4h | 32.000 | Juni | 1998 | 139.900,- |
| MMC Galant 2,0 GLS 4h | 70.000 | Mai | 1999 | 170.000,- |

opið verður leygardagin 10.03
frá kl. 11.00 til kl. 15.00

Vælkomin til

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Sosialurin - 311820